ÁRSFRÁGREIÐING 2018-2019

Aðalfundurin 10. apríl 2019

SÁTTMÁLI SAMEINDU TJÓÐA UM RÆTTINDI HJÁ EINSTAKLINGUM, IÐ BERA BREK

MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan at arbeiða við at gera neyðugar broytingar, fyri at tryggja, at arbeitt verður út frá sáttmálanum.

www.megd.fo

Ársfrágreiðing 2018/2019

Starvsnevndin
Í starvsnevndini hjá MEGD sita teir av aðalfundinum valdu limir: Forkvinnan og 4 limir.

Starvsnevndarlimir verða valdir fyri tvey ár ísenn, og kunnu verða afturvaldir eina ferð.

Forkvinnan/maðurin verður vald/ur fyri trý ár í senn, og kann afturveljast.

Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin við næstformanni.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánaðin, tó undantikið juli.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan aðalfundin í 2018, eru:

Tóra við Keldu, forkvinna

Hallur Thomsen, næstformaður

Randfríð Sørensen

Anna Petersen

Malan Mohr

Róa Midjord, tiltakslimur, hevur verið í nevndini fyri Maluna Mohr síðan sept. 2018.

Fía Petersen, tiltakslimur

Skrivstovan
Tóra við Keldu hevur verið forkvinna í MEGD síðan seinasta aðalfund, og er at hitta á skrivstovuni mikudag.

Á skrivstovuni starvast síðan 1. september 2018 Jónvør Christiansen, sum er aðalskrivari. Ása Dánjalsdóttir, skrivstovufólk, byrjaði í starvi 1. oktober 2018 og Gullbjørg Rasmussen er reingerðarfólk.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru nógvar og fjølbroyttar.

Virksemi snýr seg um umsiting av parkerings- og fylgjarakortum, hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, broyting í lógum og kunngerðum, fundarvirksemi, samskifti og ráðgeving til limafeløg, almennar myndugleikar og privatpersónar.

Fólk venda sær til MEGD við ymiskum fyrispurningum. MEGD tekur sær so vítt møguligt ikki av einstaklingamálum uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MEGD er av tí áskoðan, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamál.

Skrivstovan ger hagtøl yvir, hvussu nógv venda sær til felagið um árið. Talan er bæði um føroyingar og útlendingar.

Fíggjarviðurskiftir
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2019 er 1,65 mill. Við støði í lóg um ítróttarvedding fær MEGD tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2018 var 638.000 kr. Vit hava ikki fingið at vita enn, hvussu stór upphæddin fyri 2019 verður. Hesin peningur kemur bæði MEGD og limafeløgunum til góðar.

Býtislykilin
Sambært viðtøkunum hjá MEGD, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MEGD er frádrigin. Uppskot til nýggjan býtislykil verður lagt fram á aðalfundinum.

ST- sáttmálin
MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan at arbeiða miðvíst við at gera neyðugar broytingar, fyri soleiðis at tryggja, at arbeitt verður út frá sáttmálanum og niðurstøðunum.

MEGD hevur havt regluligt samskifti við Almannamálaráðið viðvíkjandi at seta tilmælini frá ST nevndini í verk í Føroyum. Serliga eru tað tilmælini viðvíkjandi grein 33 í ST sáttmálanum, sum snýr seg um, at limalondini skulu stovna eina ella fleiri miðsavnandi eindir, soleiðis at ásetingarnar í sáttmálanum verða settar í gildi.

Viðvíkjandi Mentamálaráðnum eru tað serliga viðurskiftir, ið viðvíkja at teksta sendingar í KVF, ið arbeitt hevur verið við. MEGD sendi í heyst áheitan til Mentamálaráðið við ynski um fund við landsstýriskvinnuna Rigmor Dam. Ikki eydnaðist MEGD at fáa fund við Mentamálaráðið. Síðan er Rigmor Dam farin frá sum mentamálaráðharri.

MEGD hevur verið á fund við nýggja kringvarpstjóran um "Public service" sáttmálam og atkomu. MEGD fegnast um, at fleiri sendingar verða tekstaðar og teknmálstulkaðar.

MEGD hevur verið á fund við Uttanríkis- og vinnumálaráðið, sum arbeiðir við at seta á stovn ein mannarættindastovn, ið skal hava eftirlit við, at sáttmálin verður settur í verk á øllum økjum í Føroyum. Ráðið avhendaði í 2017 eitt tilmæli frá einum arbeiðsbólki um, hvussu ein mannarættindaeind ella ráð eigur at verða skipað í Føroyum. Víst varð á fýra møguleikar, har eindin varð knýtt at einum verandi stovni[1]. MEGD hevur víst Almannamálaráðnum og Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum á, at Grønland hevur sett eitt talsfólk á økinum. Bjørt Samuelsen, tingkvinna setti

[1] Uttanríkis- og Vinnumálaráðið apríl 2017.
https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/9642/fr%C3%A1grei%C3%B0ing-og-tilm%C3%A6li-um-mannar%C3%A6ttindaeind-mai-2017.pdf

13.02.2019 munnligan fyrispurning til Eyðgunn Samuelsen um talsfólk á Brekøkinum. Eyðgunn Samuelsen svaraði, at hon var í gongd við at seta eina samskipandi eind tvørtur um ráðini, sum fór at gera eina brekpolitiska ætlan, har spurningurin um talsfólk fór at verða tikin við. Forkvinnan hjá MEGD hevur verið alment frammi um, at enn er eingin brekpolitisk ætlan gjørd fyri Føroyar.

Í apríl skulu Føroyar saman við Danmark til fund við ST nevndina í Geneve.

Bústaðarviðurskiftir

Ein stórur tørvur er framvegis at útvega egnaðar bústaðir til fólk við breki, serliga í Tórshavn. Í 2019 verður farið undir at byggja sambýli í Reynstúni til tey, sum búgva á Eirargarði. MEGD fegnast um, at ætlanin at umbyggja Eirargarð varð slept, og at eitt nútíðarhóskandi heim verður bygt. MEGD hevur sent hoyringsskriv inn viðvíkjandi verkætlanini í Reynstúni. MEGD hevur víst á, at ein burðardygg ætlan má gerast fyri bygging av bústøðum til fólk við breki, sum gongur tvørtur um løgtingsval.

Miðnámsútbúgving, serligt skipað miðnám

MEGD fegnast um, at 04.02.2019 fekk fyrsti føroyski næmingurin OCN-prógv á Serbreytini í tekniska skúla í Klaksvik. "Open College Network" er eitt prógv, sum fæst í samstarvi millum skúla og starvsvenjing ella læruplass. Endamálið er, at næmingurin fær eitt fult gildugt prógv fyri sínar førleikar, sum ger tað møguligt hjá næminginum at søkja arbeiði.

Atkoma

Nýggja bygningskunngerðin, sum kom í gildi 1. Januar 2017, áleggur **ikki** myndugleikunum, at **allar** íbúðir hjá Bústaðir skulu hava lyftur vm. MEGD metir, at tað er ógvuliga grundleggjandi, at allir almennir bústaðir í nýbygningum eru atkomuligar. Hóast ikki allir íbúgvar hava tørv á lyftu, so má tað vera møguligt hjá fólki í koyristóli at koma at vitja. Her má politiski myndugleikin vísa ein vilja og fíggja møguligan meirkostnað, sum stends av atkomu fyri øll. Hetta vísti Bústaðir eisini á í samskifti við MEGD um hesi viðurskifti.

Fylgjara kort

Síðan skipanin varð sett í verk, hava 370 fólk, ið bera brek fingið fylgjarakort. Í 2017 eftirmetti MEGD avtalurnar við Atlantic Airways, Smyril Line og Føroya Kommunufelag um fylgjaraskipan.

Hagtøl

Sambært grein 31 í ST sáttmálanum skulu limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, eisini hagtals- og granksingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið seta sáttmálan í verk. Í Føroyum mangla vit hagtøl fyri brekøkið. Tað manglar ein demografisk lýsing ella tørvslýsing av økinum. Høvdu vit hagtøl, var lættari at fáa eina mynd av støðuni. Tóra og Jónvør vóru á fund við Hagstovuna 13. februar 2019 fyri at hoyra um, hvørji hagtøl, tey innsamla, og hvørjir møguleikar eru fyri at fáa hagtøl innan brekøkið. Greitt er, at tað skal gerast eitt miðvíst forarbeiði og byggjast ein brúgv millum stovnar, sum innsamla hagtøl, og hvussu hesi verða send inn framhaldandi til Hagstovuna. Hagtølini skulu innsamlast sambært altjóða reglum (ST reglum). MEGD má arbeiða víðari við eini yvirskipaðari ætlan, hvørji ynskir MEGD hevur hesum viðvíkjandi. Til ber at fara inn á

heimasíðuna hjá Hagstovuni at taka hagtøl út, leinki: https://beta.hagstova.fo/ . T. d. Hvussu nógvir pensjónistar og fyritíðarpensjónistar eru í FO:
https://beta.hagstova.fo/samfelag/almannamal/pensjonistar
MEGD var á fundi við Almannamálaráðið 20.03.2019 fyri at hoyra, hvørjir møguleikar eru fyri innsavnan av hagtølum í Føroyum.

Lógararbeiði
MEGD fær nógv lógaruppskot og kunngerðir til hoyringar. MEGD sendir hoyringssvar til øll lógaruppskot, sum koma til felagið, hóast hoyringsfreistin í rættiliga nógvum førum einans er nakrar fáar dagar.

At banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum
MEGD varð boðið at vera partur av fylgibólki viðvíkjandi fyrireiking av lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum**.** MEGD vísti á, at vit hava eina lóg frá 2011 at banna mismuni vegna fólk, sum bera brek. MEGD førdi fram, at vit ynskja eina lóg at banna mismuni sum heild, men fekk svar, at hetta lógaruppskotið umfataði bert arbeiðsmarknaðin. Arbeiðið í fylgibólkinum kom ikki rættiliga í gongd. Tað var bert ein fundur, so bleiv lógaruppskotið í skundi koyrt niðan í tingið, uttan at arbeiðsbólkurin veruliga hevði havt tíð, at viðgjørt uppskotið. MEGD sendi hoyringssvar til lógaruppskotið og tekur undir við, at lógin áleggur arbeiðsgevarum tillagingarskyldu, soleiðis at neyðug tiltøk verða sett í verk, so fólk við breki hava møguleika fyri at útinna eitt arbeiði á jøvnum føti við onnur. Fylgibólkurin var innkallaður aftur við stuttari freist til fundar at gera viðmerkingar til lógaruppskotið, sama dag, sum viðgerðin var í Løgtinginum um kvøldið.

Viðvíkjandi diskriminatión út um arbeiðsmarknaðin var MEGD á fundi við Almannamálaráðið 13. juni og vísti á donsku lógina.

Verja og rætt at atkvøða
Tey, sum eru undir §6 verju, eru ómyndig í øllum viðurskiftum, og hava ikki valrætt. MEGD hevur heitt á myndugleikarnar at broyta lógina, soleiðis at hesi hava rætt at atkvøða. Danska verjulógin bleiv broytt í des. 2018, soleiðis at ávísir borgarar undir §6 verju fingu valrætt, og eiga føroyskir myndugleikar at gera tað sama. MEGD hevur 21.02.2019 fingið munnligt fyribils svar frá Almannamálaráðnum, at hetta er eitt mál, sum umfatar broyting í fleiri lógum t.e. stýrisskipanarlóg, vallóg og verjulóg, og er broytingin sostatt "krúllut". Hóast lógin verður broytt, mugu verjumál sambært §6 broytast soleiðis, at nøkur undir verju kunnu fáa atkvøðurætt. Sum lógin er í DK, eru nøkur, sum framvegis verða verandi ómyndug uttan valrætt. Sambært svarskrivi dagfest 13.03.19 frá landstýriskvinnunum í Almanna, heilsu- og innlendismálum, er tað ivasamt, um ein broyting nær at koma í gildi áðrenn løgtingsvalið, av tí at løgtingsval nærkast og freistirnar fyri at lata løgtinginum uppskot til lógarbroytingar er farin. Men sagt varð, at kanningararbeiðið kann setast í gongd. Stýrisskipanin, sum løgmaður umsitur, ásetur hvør hevur valrætt til løgtingið. Kunnað varð um, at skrivið frá MEGD er sent løgmanni til kunningar, soleiðis at landsstýrisfólkini saman við løgmanni kunnu finna útav, hvussu farast skal fram.

Formansfundir
4. september 2018 vóru umboð fyri Almannamálaráðið á fundi við limafeløgini hjá MEGD, har tey høvdu framløgu um: Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin, løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd og løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum. MEGD og limafeløgini kundu soleiðis gera viðmerkingar til lógaruppskotini, har hoyringsfreistin var 14. sept. Fleiri av limafeløgunum hjá Megd sendu viðmerkingar til lógaruppskotini. 19. mars 2019 var fyrsta viðgerð av lógaruppskotinum í Tinginum.

15. november 2018 var formansfundur, har tosað varð um, at Føroyar skulu aftur til prøvtøku í ST í 2020.

MEGD fegnast um, at fleiri limafeløg nýttu høvi at koma við uppskotum til evnislistan "list of issuses". MEGD sendir evnislista saman við Danmark og Grønlandi, har Føroyar hava ein kapitul fyri seg í evnislistanum. Viðmerkjast skal, at MEGD verður umboðað í apríl 2019 í Geneve á fundi við Martin Babu, limi í St nevndini við ábyrgd fyri DK, FO og Grønlandi viðvíkjandi rættindum hjá fólki, sum bera brek.

Umframt ST sáttmálan var á formansfundinum uppskot til broytingar í sambandi við, at feløgini senda inn limatal hjá feløgunum. Framyvir verða tað grannskoðarar ella bókhaldarar, sum gera ársroknskapin, sum fara at senda talið av limum sambært inngoldnum limagjaldi. Talan er ikki um broyttar mannagongdir fyri útgjald av stuðli, bert broyting til praktiskari uppseting av limatali.

Á formansfundinum var eisini framløga um einsemi og áhugavert kjak aftaná um, hvat kann gerast fyri at minka um einsemi.

15. mars 2019 var formansfundur í MEGD húsunum, har Bergtóra Høgnadóttir hevði framløgu um "At varðveita orkuna sum sjálvboðin". Ein gevandi fundur, har fleiri formenn/kvinnur og nevndarlimir møttu.

Altjóða Brekdagur
Tann 3. desember skipaði MEGD fyri tiltaki í Norðurlandahúsinum í samband við altjóða brekdagin. Tiltakið var ein myndaframsýning við Rick Guidotti nevnd "Broyt, hvussu tú hyggur og hygg, hvussu tú broytist".

Tiltakið eydnaðist sera væl, og nógv fólk møttu upp í Norðurlandahúsinum, bæði børn og familjur hjá teimum, sum vóru avmyndaði og onnur. Myndaframsýningin hekk uppi til 14. desember í NLH. Myndirnar eru ogn hjá MEGD, og møguleiki er at seta framsýningina uppaftur.

Heimasíðan
MEGD hevur eina virkna heimasíðu, sum er umráðandi sum samskifti úteftir. MEGD hevur eisini eina virkna síðu á Facebook.

Sosialráðgevi á LS
Sosialráðgevi varð áður settur á klinisku deildunum á LS, men tænastan varð niðurløgd fyri nøkrum

árum síðani orsaka av sparing. MEGD er gjørt vart, at sosialráðgevi eigur at verða settur aftur eins og á psykiatrisku deild, har tænastan varð sett aftur á stovn. MEGD var 6. mars 2019 á fundi við Jóanes Erik Køtlum, sjúkrahússtjóra. Sjúkrahússtjórin segði, at Sjúklingaráðið hevði reist sama spurning, men sjúkrahúsverkið hevur fíggjarligar avbjóðingar, og ongin figging er til ein sosialráðgeva. MEGD hevur sent áheitan til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í Heilsu- og innlendismálanum um, at sosialráðgevaratænasta aftur verður staðsett á LS.

Fyritíðarpensjón og gjald fyri heimahjálp
MEGD er gjørt vart við, at gjald fyri heimahjálp er kostnaðarmikið hjá fyritíðarpensjónistum, tí gjaldið er grundað á samlaðu inntøkuna hjá hjúnunum, har loftið er er 390.000, og hægsta gjaldið pr. tíma er 177 kr., tó verður goldið fyri í mesta lagi 30 tímar/mán. Ein fyritíðarpensjónistur, sum hevur 30 tímar heimahjálp kemur sostatt at gjalda 5310 kr. um mán. Saman við mistari arbeiðsinntøku hjá fyritíðarpensjónistinum og vantandi inntøkumøguleikum, er tað fíggjarliga tyngjandi at skula gjalda eina stóra upphædd fyri heimahjálp. MEGD hevur heitt á landsstýriskvinnuna at bøta hesi viðurskifti soleiðis, at mótrokning millum hjún verður strikað, og at inntøkuloftið verður hækkað. MEGD hevur fingið svar frá Almannamálaráðnum, at fyrispurningur er sendur Kommunufelagnum, fyri at fáa eina greiðari mynd av avleiðingunum av slíkum uppskoti, áðrenn málið verður viðgjørt.

Húsið
Fleiri av limafeløgunum nýta hølini í MEGD, somuleiðis er møguligt hjá øðrum at leiga hølini. 1. apríl 2019 fer Sinnisbati at flyta inn í skrivstovu hjá MEGD. Hini feløgini, sum hava skrivstovu í MEGD húsunum, eru: Gikta- , Diabetes-, Heila-, Parkinson-, Hoyr, Epilepsi-, Autismu-, Hjarta-, Psoriasis- og Alzheimerfelagið.

Norðurlendskt samstarv

HNR og Rådet för Nordisk samarbejde
Ísland hevur formansskapin í HNR (Handikaporganisationernes Nordiske Råd) 2019-2021. Tey, ið sita sum umboð fyri tey Norðurlendsku meginfeløgini eru formenn/kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum. Tóra og Jónvør fara á fund í Íslandi í mars 2019.

Rådet för Nordiskt samarbejde hevur verið virkið síðan 2013. Tóra við Keldu, forkvinna umboðar MEGD í ráðnum, og Jónvør Christiansen, aðalskrivari er tiltakslimur í ráðnum. Tóra fer á fund í ráðnum í Íslandi í mars 2019.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Dugni
Ása Olsen, fyrrverandi aðalskrivari, umboðar MEGD og er forkvinna í ráðnum fyri Dugna.

Ráðið fyri ferðslutrygd
Herit Joensen, Vestmanna, situr sum umboð fyri MEGD, og hevur hon verið umboð í ráðnum í nógv ár.

Serflutningsskipanin
Ása Olsen, fyrrverandi aðalskrivari í MEGD, situr sum umboð fyri MEGD og er skrivari í stýrinum fyri Serflutningsskipanina. MEGD er gjørt vart við, at onkur kommuna hevur sagt sáttmálan viðvíkjandi serflutningi hjá fólki 18-67 ár upp, og at eingin skipaður serflutningur varð settur ístaðin. Einki virksemi er í stýrinum fyri Serflutningstænastuna, og tí hevur MEGD sent fyrispurning til Almannamálaráðið og AV, har svarið var, at tey arbeiða við at finna eina loysn.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin
Fyri MEGD situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og dagligur leiðari á sambýlinum í Eysturstræti, og sum varalimur situr Súna Mørk, limur í nevndini í Sinnisbata.

21/03/2019/Jónvør Christiansen, aðalskrivari